## Samskifti á kristnari grund

**Havn:** Seinnapartin av apríl mánaði verður høvið hjá áhugaðum luttakarum at fáa størri kunnleika til sálarfrøðina innan samskifti og sum er bygt á kristnu lívsáskoðanina.

Tað er ein áhugabólkur, sum skipar fyri hesum fyrsta skeiðnum í eini røð av skeiðum undir heitinum Teleios.

Á skeiðnum, sum verður hildið í Meinigheitshúsinum í Havn 21. til 23. apríl verður undirvíst í samskifti. Miðað verður eftir at geva luttakarunum eina betri fatan av teimum viðurskiftum, sum ávirka samband okkara við onnur.

Endamálið við skeiðnum er at læra, hvussu ein lurtar eftir øðrum og hjálpir teimum, uttan sjálvur at gerast útbrendur. Og her er talan um samskifti bæði við familjuna, vinir, starvsfelagar og innan samkomurnar.

Undirvísarar á skeiðnum verða Jakubina Hansson og hjúnini Elsa og Tummas í Garði.

sb.

## Gera frágreiðing um føroyska málið

**Nevnd:** Ein nevnd av málkønum fólki er nú sett at gera eina frágreiðing um støðuna hjá føroyskum máli.

Henda frágreiðing skal verða grundarlag undir eini viðgerð í tinginum og undir einari politiskari støðutakan til ein almennan føroyskan málpolitikk.

Í hesi serstøku Málstevnunevndin eru 9 limir og eru teir hesi: Árni Dahl, læraraskúlalektari, formaður; Eivind Weyhe, lektari í málfrøði; Katrin M. Næs, cand. mag., ph.d. lesandi í málfrøði; Ann Ellefsen, cand. mag., studentaskúlalærari;Sólvá Jónsdóttir, M.A. í føroyskum, lærugreinaráðgevi;Hanna Jensen, M.A. lesandi í málfrøði, studentaskúlalærari; Jonhard Mikkelsen, cand. mag. læraraskúlalektari; Paulivar Andreasen, lærari og Jóhan Hendrik W. Poulsen, professari. Málstevnunevndin hittist til fyrsta nevndarfundin í næstum. Her nevndin fer at umrøða arbeiðssetning og gera eina ætlan fyri arbeiðið, ið liggur fyri framman.

sb.



*Fá útlendsk fiskiför íføroyskum sjógvi henda seinasta mánaðin*

## Fýra lond í okkara sjóøki

**Fiskivinna:** Farna mánaðin vóru einans skip úr fýra londum og royndu í okkara sjóøki.

Hesi skipini eru tvey úr ES og tvey aðrastaðni frá. Úr ES-londunum hava bert týsk og bretsk skip verið her, og annars vóru bert norsk og russisk skip og royndu her.

Hesi skipini hava roynt eftir mongum ymiskum fiskasløgum. Í roynd og veru eru tað bert fimm fiskasløg sum einki er veitt av: Sild, makreli, rossamakreli, brugdulivur og prikkafiski.

Íalt vórðu veidd góð 2000 tons í okkara sjóøki. Av hesum vóru tey 1300 tonsini svartkjaftur.

sb.

# Smyril sum eitt stórt listasavn

**Ferðafólkini umborð á Smyrli nýtast ikki longur at keða seg allan túrin um Suðuroyarfjørð. Runt um í skipinum ber nú til at síggja nýggja list, sum sjey ung listarfólk hava skapað. Ein føst framsýning verður umborð, umframt ein part sum verður skift út við hóskandi millumbilum.**



*Fríða Brekku var fyrsta listarkvinnan sum hevur latið upp eina framsýning umborð á nýggja Smyrli. – Vit ynskja at framsýningarnar umborð skulu vera fjølbroyttar og spennandi fyri ferðafólkini, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni Mynd: Jens Kr. Vang*

SKIPSLIST
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Smyril:** – Eg gjørdist sera glað, tá eg fekk áheitan um at hava hesa fyrstu framsýningina umborð á Smyrli.

Listakvinnan Fríða Brekku var tann fyrsta sum slapp av vísa fram myndir sínar umborð á Smyrli.

Á hesi framsýningini eru íalt 18 myndir, og koma hesar at hanga uppi í eina tíð.

Fyrrapartin í dag lat hon upp hesa øðrvísi framsýningina umborð á Smyrli.

– Eg havi her serliga hugsað um føroysk myndevni. Og tí eru oyggjar og skýggj ein týðandi partur av mínum myndum, sigur hon.

Ynski hennara er, at ferðafólkini kunnu njóta øll listarverkini umborð. Á henda hátt sleppa tey undan at keða seg ta løtuna, tað tekur at sigla á Trongisvágsfjørð.

Samstundis við hesa framsýningina hjá Fríðu eru sjey onnur ung listarfólk biðin um at vísa fram listarverk síni á ymiskum støðum í skipinum. Hesi listarverkini verða kortini hangandi framyvir.

### Ein estetisk heild

Hugsanin um at myndprýða nýggja Smyril á henda hátt er ikki nýggj.

Meðan arbeitt hevur verið við byggingina, hevur ein samstundis fyrireikað ætlanina um, hvussu skipið skuldi prýðast.

Ætlanin hevur allatíðina verið, at henda prýðing skuldi vera ein heildarupplivíng. Hon skuldi vera í tráð við innrættingina umborð og skuldi haraftrat leggja nakað eyka í upplivingina at sigla við flaggskipi okkara.

– Okkara vón er, at henda prýðingin skal roynast fjølbroytt og spennandi fyri ferðafólkini.

– Men hetta skal eisini verða sum ein estetisk heild, sum kann siga eina heila søgu. Og tí haldi eg eisini, at hesi verkini siga á hvør sín hátt ein part av søguni um føroyska myndlist, segði stjórin á Strandferðsluni, Kristian Davidsen tá framsýningin lat upp í morgun.

Tað er tí ikki ov nógv sagt, at henda framsýningin er endin á ætlanini at prýða nýggja Smyril.

Hetta er samstundis byrjanin til eina nýggja uppliving hjá ferðafólki av list. Av tí at hetta er eitt ferðafólkaskip, kunnu tí nógv fleiri fólk enn annars gerast kunnug við, hvussu stórt fjølbroytni sum finst innan føroyska list.

### FAKTA

**SJEY LISTARFÓLK**

Tey sjey listafólkini sum framsýna verk síni umborð á Smyrli eru hesi: Hansina Iversen, Anker Mortensen, Rannvá Pálsdóttir Kunoy, Aggi Ásgerð Ásgeirsdóttir, Hanni Bjartalíð, Marius Olsen og Bjarne Werner Sørensen.

Felags fyri tey er at tey eru øll fødd eftir 1960, hava útbúgving innan list og arbeiða sera vitandi við føroyskari málningahevd.

Nú hava tey so fingið møguleikan at lýsa føroyska list úr einum skipi. Og hesa avjbóðingina hava tey megnað sera væl.

# Spennandi skrá letur upp fyri tunlinum

**Nú tað av álvara styttist til dagin, tá Norðoyatunnilin fer at lata upp, koma fyrstu tiltøkini undan kavi í hesum sambandi.**

TUNNIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Leygardagur 29. apríl er søguligi dagurin hjá norðoyingum og føroyingum í síni heild.

Henda dagin verður á fyrsta sinni koyrandi undir Leirvíksfjørð.

Hetta er ein hending, sum ein ikki ætlar at lata fara aftur við borðinum. Hetta skal markerast og tað við lít.

Í hesum sambandi er settur ein samskipari til øll hesi tiltøkini, Steintór Rasmussen. Saman hava tey arbeitt við hesum og er longu ein fyribilsskrá almannakunngjørd.

Sagt verður tó, at henda skráin verður dagførd leypandi. Og tí er líkt til, at tey vitjandi í Klaksvík fara at fáa ein hóp av spennandi tiltøkum at velja millum.

### Suð og framsýning

Fyrireikingararbeiðið hjá arbeiðsmonnum og samskipara hevur gingið so væl, at nú er klokkutíð sett á, nær tunnilshátíðarhaldið fer at byrja.

Sambært skránni fer hátíðarhaldið at byrja kl. 14 og varir í slakar tveir tímar. Men bæði fyri og eftir hetta verða nógv onnur tiltøk á skránni.

Tiltøkini byrja í roynd og veru 13. apríl, tá sangbólkurin Suð og Vokalkompagniet fara at hava konsert. Og 22. apríl skal serstaka Tunnilskórið venja.

Sjálvur hátíðardagurin byrjar árla á morgni, tá Dúgvan og Ternan fara at flyta ferðafólk um fjørðin. Eru tey nóg tíðliga á fótum, verða tey møtt av livandi tónleiki í býnum.

Fleiri framsýningar eru eisini at fara til. Ein listaframsýning verður við listarfólkum úr Norðoyggjum, og annars verður framsýning um Klaksvíkar Sjúkrahús og framsýningin á Norðoya Fornminnissavni.

Seinnapartin lata handlar og framsýningarnar upp aftur, og síðani er Open by night úteftir.

Dagin eftir er longu greitt, at tvey spennandi tiltøk verða á skránni sum helst fara at savna nógv fólk.

Í fyrsta lagi fer KÍ at spæla heimadyst móti B68 av Toftum kl. 15, og kl. 15:30 fer Suð at framføra Messias í Christianskirkjuni.

Sum skilst er alt sum bendir á, at talan nærum verður um eina býarstevnu, tá Norðoyatunnilin letur upp.